# Jólini

á Tvøroyri 2020

## Skrá

FRÍGGJADAGIN
27.
NOVEMBER

**09:00-22:00** **BLACK FRIDAY**

Handlarnir á Tvøroyri hava spílað seg út og eru á tremur við góðum tilboðum. Júst "Black Friday" eru heilt serlig tilboð á skránni - ein upplagdur dagur at fáa jólagávurnar til høldar!

**17:00** **JÓLATRÆIÐ Í TRONGISVÁGI**

Kl. 17:00 verður jólatræið í Trongisvágið tendrað. Viberg Sørensen heldur røðu og Tvøroyrar Hornorkestur vitjar. Bjóðað verður kaffi og gløgg frá Glasstovuni.

**18:00** **JÓLATRÆIÐ Í FROÐBA**

Kl. 18:00 verður jólatræið í Froðba tendrað. Jens Arni Hammerfoss heldur røðu og Tvøroyrar Hornorkestur vitjar. Bjóðað verður kaffi og gløgg frá Glasstovuni.

SUNNUDAGIN
29.
NOVEMBER

**14:00-21:00** **JÓLAMARKNAÐUR Á SEGLLOFTINUM**

Árligi, sera væl umtókti jólamarknaðurin á Seglloftinum letur upp kl. 14:00. Her er alskyns heimavirkað á skránni: Klædnapløgg, jólapynt, góðgæti og mangt annað.

**17:00** **JÓLATRÆIÐ Í MIÐBÝNUM**

Kl. 17:00 verður jólatræið í miðbýnum tendrað. Jónsvein Bech, prestur, heldur røðu og Tvøroyrar Hornorkestur spælir nøkur løg. Jólamenninir vitja eisini og deila pakkar út til børnini. Bollar og kakao verður at fáa. Atlit verða tikin til koronatilmælini frá heilsumyndugleikunum.

LEYGARDAGIN
5.
DESEMBER

**18:30** **JÓLAGONGUTÚRUR Í MIÐBÝNUM**

Chris Jan Michelsen verður frásøgumaður á hugnaligum gongutúri í miðbýnum. Sagt verður frá ríku søgu Tvøroyrar og vitjað verður m.a. á Tvøroyrar Skjalasavni og Snaruni.

**20:00** **JÓANES NIELSEN Í GLASSTOVUNI**

Í ár gav navnframi Jóanes Nielsen út yrkingasavnið "Rakkaljóð". Jóna Midjord fer at práta við Jóanes um skaldskap hansara og Jóanes fer at lesa yrkingar upp, úr nýggja savninum. Tiltakið er ókeypis, men til ber at keypa sær okkurt forkunnugt afturvið, ið Glasstovan borðreiður við - hugnaliga Glasstovan er opin til kl. 24:00 hetta kvøldið.

SUNNUDAGIN
6.
DESEMBER

**13:00** **JÓLATRÆIÐ Í ØRÐAVÍK**

Hátíðarløta í Ørðavík. Jólatræið verður tendrað og Jónsvein Bech, prestur, sigur nøkur orð. Tvøroyrar Hornorkestur spælir nøkur løg og aftaná er opið í  Bønhúsinum,har kaffi og smákøkur verða at fáa.

SUNNUDAGIN
6.
DESEMBER

**16:00** **JÓLAKONSERT Í SALT**

Rimmar jólakonsert í SALT. Tvøroyrar Hornorkestur spælir kendar klassikarar. Solistar eru: Kim Hansen, Guðrun Sólja Jacobsen, Dennis Lave, Tróndur & Lív, Sólfríð Bech og Eyðun Nolsøe. Rútmiska orkestrið er: Kim Hansen, klaver, Tróndur Enni, bass, Dennis Lave,trummur, Hjørtur Háberg, trummur, Janus Kampmann, elguitar og Eyðun Nolsøe, acc. guitar.

LEYGARDAGIN
12.
DESEMBER

**17:00** **JÓLASØGUR Á SAVNINUM**

Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn bjóðar á gátt, til spennandi ævintýraløtu, við Álvi Enni, ið lesur jólasøgur upp fyri børnunum. Børnini fáa kakao og foreldrini kunnu fáa sær ein munn av jólagløgg.

SUNNUDAGIN
13.
DESEMBER

**16:00** **JÓLINI VERÐA SUNGIN INN**

Tvøroyrar Kirkja letur dyrnar upp til árliga tiltakið, har jólini verða sungin inn. Á skránni er felagssangur og tónleikaframførslur frá smærri bólkum og einstaklingum. Uml. 200 fólk sleppa inn, í samsvar við leiðreglurnar frá heilsumyndugleikunum. Tiltakið verður eisini stroymt og til ber at finna leinkjuna á tvk.fo.

**18:00** **JÓLAHUGNI Í PLANTASJUNI**

Ljósprýdda "Plantasjan" í Trongisvági er karmur um afturvendandi jólahugnan við felagssangi og nissuvitjan. Bollar og kakao verður eisini at fáa.

ÓNSDAGIN
16.
DESEMBER

**19:00** **JÓLATJALDIÐ Í MIÐBÝNUM**

Stuðulsfelagið Næstin, ið savnar inn pening til gøtubørn í Kenya, skipar fyri stórum jólamarknaði í tjaldinum í miðbýnum. Tónleikainnsløg verða eisini á skránni.

LEYGARDAGIN
19.
DESEMBER

**17:00** **JÓLASKIPIÐ KEMUR TIL TVØRAKAI**

Jólaskipið leggur at Tvørakei við jólamonnum umborð. Teir bjóða børnunum okkurt leskiligt og práta við tey.

SUNNUDAGIN
20.
DESEMBER

**11:00** **JÓLADYPP Í TJALDAVÍK**

Í vøkru Tjaldavíkini ber til at "jóladyppa" henda sunnumorgun. Fyriskipararnir heita á fólk um eisini at fara í nissuhúgvu - omaná dyppið verður bjóðað gløgg og vaflur.

TÓRSDAGIN
31.
DESEMBER

**NÝGGJÁRSHALDIÐ Á TVØROYRI**

**10:00** Morgunmatur á Seglloftinum. Nýggjársnevndin á Tvøroyri og Seglloftið skipa fyri morgunmati - øll eru hjartaliga vælkomin.

**14:00** Árliga "pílagrímsferðin" niðan á Oyrnafjall. Fólk hittast við verkstaðin hjá Simo við Gamlansá. Komin oman aftur, bjóðar Tvøroyrar kommuna suppu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**23:30** Kyndlagonga, nýggjársbál og fýrverksshow við Ítróttarhøllina í Trongisvági.

TVØROYRAR KOMMUNA

*Til øll tiltøk verður heitt á fólk um at virða almennu tilmælini um frástøðu og reinføri, fyri at fyribyrgja koronusmittuni. Fyrivarni verður tikið fyri herdum tilmælum frá heilsumyndugleikunum, ið kunnu viðføra broytingar ella avlýsingar.*

Visit Suðuroy

## UPP- OG AFTURLATINGARTÍÐIR HJÁ HANDLUNUM Á TVØROYRI

FRÍGGJADAGIN
27.
NOVEMBER
**BLACK FRIDAY**
opið til kl. 22:00

FRÁ TÓRSDEGNUM
17.
DESEMBER
TIL
TÝSDAGIN
22.
DESEMBER
opið til kl. 20:00 allar dagar

ÓNSDAGIN
23.
DESEMBER
**Lítla jólaaftan**
opið til kl. 22:00